LM-050/2025

FYLGISKJAL 4

Frá: FM1

Til: Mentamálaráðið

Dato: 07.10.2025

Til rætta viðkomandi.

Góðu tit, sum stjóri hjá FM1 (spf.01.01.2014), vil eg hervið geva eina viðmerking til uppskotið um nýggja løgtingslóg um miðlastuðul.

Vit hjá FM1 meta, at tað er bæði týdningarmikið og rætt, at lógin verður endurskoðað og løgd soleiðis til rættis, at hon veruliga styrkir føroyska miðlalandslagið.

Vit eru samd í, at verkætlanarstuðulin eigur at fara burtur. Stuðulin hevur í verki ofta givið stuttvarandi avrik, men ikki endiliga styrkt føroysku miðlarnar burðardygt. Tí halda vit, at stuðulsskipanin eigur at leggja størri dent á menning og dygd í longdini. Grundleggjandi eru vit eisini ímóti at hava eina almenna yvirredaktión, sum brýtur við armslongdar- prinsippið.

Vit eru sera varin, tá tað kemur til uppskotið um ein nýggjan íverksetanarstuðul. Vandi er fyri, at hesin stuðul kann skapa fleiri veikar pop-up miðlar, í staðin fyri at styrkja teir, sum longu eru. Vit meta, at tað er at halda verandi miðlar fyri gjøldur, um ein stuðul skal verða settur av til at hjálpa nýggjum miðlum at byrja, meðan teir miðlarnir, sum longu hava bygt seg upp ígjøgnum mong ár við áhaldni, hørðum arbeiði og íløgum, skulu stríðast fyri at yvirliva. Vit meta ikki, at tað er haldført at brúka almennan stuðul til at konstruera nýggjar miðlar, heldur enn at styrkja teir, sum longu hava prógvað sín týdning og sína samfelagsligu ábyrgd.

Vit síggja í dag, at fleiri miðlar søkja samstarv og felags loysnir, tí tað er torført at reka miðil á fíggjarligum grundarlagi. Hetta bendir á, at tørvur ikki er á fleiri miðlum – men heldur færri, sterkari og betur útbygdum miðlum, sum megna at framleiða egið tilfar og dygdargóðan journalistikk, heldur enn at endurgeva tíðindaskriv, sum tíverri er nakað vit síggja alt meira til.

Tí vil eg mæla til, at í staðin fyri ein íverksetanarstuðul, verður ein tøknimenningarstuðul, settur á stovn, har miðlar kunnu søkja um stuðul til keyp av tekniskari útgerð og framleiðslutólum. Hetta hevði verið ein ítøkilig og gagnlig loysn, sum kann menna føroysku miðlarnar fakliga og tøkniliga, soleiðis, at vit gerast enn betri før fyri at miðla tíðindi og innihald í ljóði, mynd og teksti við dygd og trúvirði.

Við einum slíkum átaki kundi miðlastuðulin veruliga virkað sum ein styrkjandi og framtíðartryggjandi átak í føroyska miðlalandslagnum.

Vinaliga,

Durita Adela Joensen

Stjóri, FM1/ Voxpop

Tel. 555005